# Gamli jólamaðurin aftur til heiður og æru



Góði gamli jólamaðurin hjá Kathrinu Christiansen er nú aftur at síggja - tó ikki sum fyrr í sýnisglugganum á Áarvegnum, nei í ár er hann at síggja í sýnisglugganum í Bartskersstovu í Bringsnagøtu
Mynd: Jens Kristian Vang

Tey, sum vóru børn í fimmti, seksti, sjeyti, áttati, og kanska nítiárunum við, minnast jólamannin hjá Kathrinu Christiansen á Áarvegnum í Havn. Tað var ein tann størsta hendingin í jólmánaðinum - eftir at hava sæð jólatræið í garðinum hjá G - at sleppa oman á Áarvegin at síggja jólamannin taka telefonina og skriva niður jólaynski barnanna.

Seinnu árini hevur hann tó ikki verið at sæð - kanska tí at handilin hjá Kathrinu Christiansen ikki longur hevur sýnisgluggan niðri á Áarvegnum, men eisini tí, at hann ikki hevur verið í so góðum standi.

Men nú er hann aftur at síggja. Hesaferð hevur Haldor sett jólamannin í gluggan í handlinum í Bartskersstovu í Bringsnagøtu. Í gamlari tíð var tað ein bjølgur, sum fyltist við luft, sum fekk hann at reisa seg. Hetta er nú gjørt soleiðis, at hann mekaniskt kann reisa seg við einum elmotori - og nú sær hann út sum fyrsta dagin.

Jól vóru ikki í Havn, fyrr enn Jólamaðurin sást á Áarvegnum. Hann hevði ómetaligan týdning fyri børnini - og barnagarðar leitaðu í flokkum oman á Áarvegin. Ja, í veruleikanum hevði hesin í dag so lítillætni jólamaðurin nógv størri týdning, enn stórir jólabýir hava í dag.

Børn og vaksin, um í hesum døgum leita sær út á Jólagøtuna úti á Reyni, eiga at hyggja framvið Bartskersstovu, so um ikki annað foreldrini kunnu gleðast um aftur at síggja góða gamla jólamannin.


























